# Serstakt ár hjá Bókadeildini

**2005 gjørdist eitt serstakt bókaár fyri Bókadeild Føroya Lærarafelags við bæði virðislønum og fleiri sermerktum og nýskapandi útgávum**

BFL
Anna V. Ellingsgaard
anna@sosialurin.fo


*Lesarar kunnu vænta sær ikki færri enn tríggjar upprunaføroyskar ungdómsbøkur frá Bókadeildini komandi ár, avdúkar Niels Jákup Thomsen*

Við meir enn 50 útgávum í ár er Bókadeild Føroya Lærarafelags uttan samanbering virknasta forlagið í Føroyum. Men tað er ikki bara talið á útgávum, sum fær Bókadeildina at skara framúr. Tað er nær við, at virðislønir hava lyndi til at regna yvir útgávur hjá forlagnum, og onkur av teimum hevur í ár skrivað seg slóðbrótandi inn í føroyska útgávusøgu.

### Fingurin á pulsinum

- Eg vildi ynskt, at onnur forløg í Føroyum høvdu somu umstøður at virka undir, sum Bókadeildin, segði Niels Jákup Thomsen, stjóri á forlagnum á árliga bókadegnum herfyri. Neyvan er tað bara umstøðurnar, sum gera tað - vit onnur kunnu í øllum førum staðfesta, at forlagið megnar at umsita sína orku og játtan á ein fyrimyndarligan hátt, tá tað ræður um barna- og ungdómsútgávur.

Umframt allar tær meir vanligu útgávurnar hevur forlagið aftur í ár víst, at tað ikki aftar seg við at taka av rættiliga avbjóðandi og øðrvísi útgávuuppgávum. Tá ongin annar vildi ella tordi, var tað ikki óvæntað Bókadeildin, sum átók sær uppgávuna at geva út Trøllið hjá Pápaleysa, sum er fyrsta føroyska royndin at geva út eina samansetta bóka/DVD útgávu. Orginala hugskotið við at samantvinna eitt gamalt føroyskt ævintýr við nýmótans tøkni endaði eisini við at geva Inga Joensen og Grafik Studio Barnabókaheiðursløn Tórshavnar Býráðs fyri Trøllið hjá Pápaleysa.

Síðani eru komnar ein røð av útgávum, sum ikki bara eru framúr snøggar, sum til dømis skreytútgávan av Ævintýrinum um Pinocchio, men sum eisini vísa, at Bókadeildin allatíðina hevur ein fingur á pulsinum við tí, sum hendir á altjóða bókamarknaðinum. Herfyri kom til dømis triðja og seinasta bind í tríverkinum Myrkursins Frumevni - eitt verk, sum í 2001 kom inn á triðja pláss í altjóða kapping um Aldarinnar Bók. Eisini kann nevnast, at ein av fyrstu útgávunum hjá Bókadeildini í ár var stóra savnið av H.C. Andersen ævintýrum, sum Bókadeildin í samstarvi við H.C.A grunnin gav út í sambandi við H.C. Andersen hátíðarhaldið.

Nú árið er um at verða liðugt, kann ikki sigast annað, enn at Bókadeildin endar tað við manér. Fyrst í hesum mánaðinum varð greitt, at nógv umrødda myndabókin Ein hundur, ein ketta og ein mús er innstillað til Bókavirðisløn Útnorðurráðsins 2006, sum kemur afturat heiðurinum, at bókin í løtuni verður týdd til bæði franskt og íslendskt.

Og sum prikkurin yvir i'-num gav Bókadeildin fyrr í vikuni út føroysku týðingina av sættu Harry Potter bókini bert fáar mánaðir eftir, at upprunbókin kom út í Onglandi.

### Kapping um ungdómssøgu

Hvussu komandi bókaár hjá Bókadeildini fer at hilnast er ilt at spáa um, men okkurt bendir á, at vit kunnu vænta okkum fleiri upprunabøkur á føroyskum. At tað finnast føroyingar, sum duga at skriva dygdargóðar ungdómsbøkur, ivast Niels Jákup als ikki í og sipar til ungdómssøgukappingina, sum forlagið skrivaði út í 1989, tá Skuggar eftir Lydiu Didriksen, Regin og Sára eftir Heina Hestoy og Supeia eftir Sonju Sørensen vunnu ávikavist 1., 2. og 3. virðisløn. Hesar bøkur hava verið trálisnar av føroyskum ungdómi líka síðani, og forlagið eggjar áhaldandi fólki til at lata inn upprunaføroysk handrit. Í eina tíð hevur Bókadeildin arbeitt við tankanum um at skriva út enn eina kapping um nýggjar ungdómssøgur. Væntandi verður kappingin skrivað út í 2006, og so er bert eftir at vóna, at fólk vilja taka við avbjóðingini, sigur Niels Jákup Thomsen.

Fyribils kann Niels Jákup tó avdúka, at ikki færri enn tríggjar upprunaføroyskar ungdómsbøkur verða at síggja í bókahandlunum komandi ár.

# Eitt støddfrøðiævintýr

**Nú kunnu børnini í 1. flokki læra seg at rokna saman við Fryntunum í Fryntavík. Fryntligu verurnar spæla nevniliga ein spennandi leiklut í roknibókini Skygni 1b, sum Føroya Skúlabókagrunnur gevur út í næstum**

ROKNIBÓK
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*



*Nýggja roknibókin Skygni 1.b til 1. flokk frá Føroya Skúlabókagrunni er munandi meir hugalig og spennandi enn roknibøkur flest*

Nýggja roknibókin Skygni 1b til 1. flokk frá Skúlabókagrunninum má sigast at vera munandi meir hugalig og spennandi enn roknibøkur flest. Børnini skulu sjálvsagt framvegis læra at rokna, men at hjálpa sær hava tey fingið fryntligu Fryntarnar í Fryntavík, sum Edward Fuglø hevur gjørt til ein heilan myndaheim fyri seg í bókini.

### Kendur ænintýrheimur

Saman við tekingunum og søgunum, kunnu næmingarnir fylgjast við Fryntunum og gruna yvir tær ymsu rokniavbjóðingarnar, teir renna seg í. Í Fryntavík hava tey til dømis bara eina klokku, sum sigur dingdong. Ein dagin fáa teir eina klokku við tølum á, og skjótt finna teir út av, at tá kokkan slær ding-dong fýra ferðir, svarar tað til talið 4 á klokkuni. Soleiðis læra teir eisini at brúka tøl, tá teir telja eggini hjá hønunum, har teir fyrr bara hava dugað at seta strikur.

Gundur Mortensen, ritstjóri, sigur, at umframt at læra at rokna, er ætlanin við Skygnibókunum eisini er at fáa børnini at gruna eitt sindur yvir, hvat býr aftanfyri tey ymsu støddfrøðiheitini, so tað verður lættari at fata tey.

Í Skygni 1b er ein hugtakandi søga um lívið hjá Fryntunum og ein mynd av Fryntavík, sum børnini kunnu heingja upp heima við hús. Soleiðs kunnu børnini altíð hava hendan ævintýrheim fyri eyga, tá tey skulu hjálpa Fryntunum at loysa onkra av rokniuppgávunum í bókini.

Sjálvt um hetta er ein ævintýrheimur, er tað lætt hjá børnunum at kenna seg sjálvi afttur í tí, sum hendir. Fryntarnir gera nevniliga alt sovorðið vanligt sum at keypa, selja og veksla pengar, og út frá tekningunum sær alt hetta út til at ganga fyri seg onkustaðni í Føroyum.

Tað eru Mortan Dalsgarð og Edvard Olsen, sum hava týtt Skygni úr donskum og lagað hana til føroysk viðurskifti saman við Gunduri Mortensen og Edwardi Fuglø.

NÝGGJAR BØKUR FRÁ
**BÓKADEILD KFUMS**

**JÓLABOÐ 2005**
*Í Jólaboð eru siðsøguligar greinir og upprunaligar og týddar søgur og yrkingar.*
***80 síður, kr. 90,-***







**Robinson Krusoe**
*Gitin er um allan heim Robinson Krusoe, sum Joachim Heinrich Campe skrivaði eftir heimsgitnu skaldsøgu Daniel Defoes.*
***220 síður, kr. 220,-***

**Bókadeild KFUMs**
Hoydalsvegur 6, Box 86, 110 Tórshavn
tel 21 18 24, fax 31 79 60, kfum@kallnet.fo